# Ein partur av føroyskari mentan

*Tað er ein partur av føroyskari mentan, at allir hesir bátarnir liggja her hesa árstíðina, sigur ein útróðrarmaður, sum komin er av Tvøroyri til Eiðis at rógva út, nú várróðurin skuldi verið upp á tað besta*

EDVARD JOENSEN

Kuldin merkist inn á bein, nú sólin er við at seta handan fjøllini á Streymoynni. Inni í havnini á Eiði er stilli, hóast eitt lítið lot var at merkja longri uppi í bygdini. Bátarnir koma hvør eftir annan spakuliga inn um grótkastið og leggja seg at bíða eftir landingartørni. Teir eru nógvir, og bara tveir kranabilar eru á bryggjuni.

Tað er fitt av fólkið á bryggjuni. Einir sjey-átta mans taka í móti fiskinum. Stoyta í kør, ísa og fáa upp í lastbilar og trailarar, sum skulu føra fiskin út á Toftir, har hann skal á uppboðssølu í morgin. Mest er av fullum køssum, sum fer í bilarnar, men eisinifara nakrir tómir.

»Tað er eitt sindur øvugt«, heldur Konrad, sum situr á truckinum, »at koyra tómar kassar út á Toftir og norður aftur í morgin.«

Men støðan er akutt har úti í kvøld. Eingir tómir kassar eru eftir á Toftum.

Ein stórur plastbátur kemur við ferð fram við bryggjuni. Bakkar harðliga og liggur sum hítin undir reyvini á Sigmundi, sum júst fær agn umborð. Hann hevur landað á Eiði. Tað sama hava Thomas Nygaard og Fugltúgvan, sum liggja longri frammi við bryggjuna.

Jógvan letur krókin niður. Maðurin í bátinum krøkir í, og Sonni stoytir so úr kassanum hjá bátinum í tann stóra kassan, sum stendur á bryggjuni. Kassamiðstøðin stendur á kassanum. Men ongum nýtist at óttast, at bland kemur í. Hans Egil bindur ein seðil við bátanavni og nummari á hvønn kassa.

Eldru menninir og onkur smádrongur standa fram við bryggjukantinum. Tosað verður um, hvussu bátarnir eru útgjørdir, hvussu nógv teir munnu hava fingið, og spurt verður eftir líkindum, og hvar teir hava verið. Alt samalt ein partur av føroyskari mentan.



*Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna, Chris Jan Michelsen, er júst komin aftur av útróðri ( Mynd: Edvard Joensen)*

### Viðrað illa

Tað hevur ikki viðrað serliga væl í ár, sigur maðurin, sum er komin norður um fjørð við bátinum Barbaru av Tvøroyri. Ein hvítur AWI bátur, sum eigur landingartørn nakað soleiðis miðskeiðis í flokkinum.

Maðurin er Chris Jan Michelsen, formaður í Meginfelag Útróðrarmanna.

Hann letur at, at smáligt hevur verið fyrr í ár, men í dag letur til, at ein lítil bati hevur verið. Eini 1.000 - 1.500 pund upp á bátin, metir hann, at úrtøkan er í dag. Teir hava verið spjaddir um alla várleiðina, sigur Chris Jan Michelsen. Tað letur til, at fiskurin stendur nokk so víða norðanfyri. Og slagið er rímiliga gott, sigur hann. Rognini eru góð.

Bátarnir eru nógvir. Tað komu 16 ella 17 bara av Tvøroyri. Umframt vágbingar, havnarmenn, strandingar og sjálvandi eisini eiðisbátar. So tað eru rættiliga nógvir tilsamans, sigur Chris Jan Michelsen.

Hann sigur, at suðringarnir plaga at siga, at tá teir nú eru komnir norður um, verða teir verðandi, til onki er eftir. Men tá tað líður nakað út, og okkurt sjaskveður kemur, plaga teir kortini at ótolnast og vilja sleppa suður um aftur.

Tað er eisini eitt sindur ójavnt, sum menn siga vártíðina at vera. Onkur plagar at siga, sigur Chris Jan Michelsen, at hon er til fimta mai, meðan aðrir halda hana vera væl styttri.

Vanligt er, sigur Chris Jan Michelsen, at tá fiskurin hvørvur norðan fyri, fara teir suður aftur og plaga so at royna vestan fyri Sandoynna. Tá verður róð út av Tvøroyri, sigur hann.

Tað hevur viðrað illa í vár, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna. Hann kom saman við øðrum suðringum norður til Eiðis beint eftir mánaðarskiftið, og hevur bara havt fýra útróðrardagar, nú bara ein vika er eftir av mars. Onkur av teimum størru bátunum hevur verið seks dagar á útróðri. Men tað er heldur ikki nakað at tosa um.

Men prísurin er góður, sigur hann. Sum tað hevur verið higartil, liggur hann umleið 1.000 krónur fyri sentnaran, sum suðringarnir siga. Ein sentnari er 100 pund. Eisini fæst góður prísur fyri rognini í løtuni.

Teir allarflestu bátarnir eru mannaðir við einsamøllum monnum. Við onkrum hendinga eru tveir, men teir eru fáir, sigur Chris Jan Michelsen.

### Sum at vera skóti

Hetta eru smáir bátar, men menn búgva umborð alla tíðina, teir eru her norðuri.

Tað kann verða eitt sindur buldrasligt, men hevur tú verið skóti, hevur tú onga neyð, sigur Chris Jan Michelsen, formaður í Meginfelag Útróðrarmanna.

Sjálvur var hann skóti, til hann var eini 16-17 ár, greiðir hann frá. Og hetta líkist eitt sindur skótalívinum at skula lívbjarga sær soleiðis, heldur hann. Tað, sum um ræður, er at hava hita. So gongur alt, sigur útróðrarformaðurin.

Hann letur at, at tað kann vera rættiliga hugnaligt, hóast tað ganga nógvir dagar, at ikki verður loyst.

Menninir eru nógvir og koma nógv saman at tosa um eitt sindur av hvørjum. Nú er fullveldið og samráðingarnar eitt upplagt evni. Veður og vindur fáa sjálvandi sítt, og so er Chris Jan sjálvur so mikið væl fyri, at hann hevur eitt lítið sjónvarpstól, so hann sær Dag og Viku og kann fylgja við tann vegin.

»Tað verður ein sovorðin bygdarmentalitetur«, sigur hann. »Nei, tíðin fellur ikki long«.

Teir eru farnir heiman upp á hetta her, og tað hava teir innstillað seg uppá.

Tað er ikki endiliga tí, at tað eru so nógvir pengar í hesum, heldur Chris Jan Michelsen. Uppiløgurnar kunnu vera drúgvar, og tá er einki at vinna.

Men okkurt er kortini við hesum, sigur hann, tí hetta eru somu menninir, sum koma aftur ár um ár við somu bátunum. So tað man bera til kortini, heldur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna.

Tað rýkur úr roykhanusi á innasta bátinum. Fleiri mans koma inn á dekkið og standa og práta. Hetta eru menn av onkrum av hinum bátunum, sum liggja her við flótibrúnna.

Á veg í land aftur verður hugt inn í stýrihúsið á hesum bátinum, haðani roykurin kemur.

Jú, hetta er Egil M, og har situr Arthur frammi í lugarinum við eini steikipannu. Hann steikir fisk, og tað luktar so hugnaliga av pipari. Hann hevur skorið sær fløk av nøkrum smáfiskum, hann fekk í dag, og latið ivaleyst av salti og pipari á, sigur hann.

Tað skal fáast hiti í aftur kroppin, heldur Arthur. Hann letur at, at tað var so beistaktiga kalt norðan fyri í dag. Hann var bæði í termotroyggju og oljuklæðum, men stóð kortini og skalv. Og so rullaði tað eisini so forb..... illa í morgun.

Men tað er nú ikki tað ringasta. Tað, sum verri er, sigur hann, er, at hann eigur ongan leyk at koyra oman yvir fiskin, sum nú rættiliga er farin at sjóða, so hvørt sum hitin veksur undir pannuni.



*Nógvir fremmandir bátar eru komnir til Eiðis at rógva út, nú várróðurin skuldi verið upp á tað besta. Tá allir koma aftur í senn, kann gerast trongt við brúnna, og neyðugt verður tí at bíða eftir landingartørni (Mynd: Edvard Joensen)*





# Rossafelag í Norðuroyggjum

*Norðoyingar hava nú fingið sítt egna ríðingarfelag.*

DÁNJAL HØJGAARD

Herfyri varð Norðoya Rossafelag sett á stovn.Fyribils eru 20 limir í Norðoya Rossafelag,sum eiga 14 ross.

Felagið hevur til endamáls at stimbra umstøðurnar hjá ríðingarfólkinum í Norðoyggjum. Felagið ætlar at byggja felags fjós og at vala um fjallgøturnar, ríðið verður eftir. Eisini er ætlanin at skipa fyri felags ríðiferðum.

Rossafelagið er ikki bert fyri kappríðarar, men fyri fólk, sum hava áhuga fyri rossum og ríðing yvirhøvur. Hinvegin dylja stigtakararnir ikki fyri, at teir vóna, at felagið kann eggja fleiri norðoyingum at ríða kapp,tí tað eru ikki nógvir kappríðarar í Norðoyggjum.

Fyrireikararnir vóna, at limatalið í rossafelagnum í Norðoyggjum fer at vaksa, tá ið gongd er komin á virksemið:

- Tá ið umstøðurnar eru komnar í rættlag vænti eg, at felagið fær fleiri limir og at fleiri ross verða knýtt at felagnum, sigur Ólavur Johannesen, stigtakari til Norðoya Rossafelag.

# Herferð um trygdarbelti hevur onga ávirkan

Tá danska Ferðslutrygd í 1998 gjørdi kanningar saman við løgregluni, vísti tað seg, at 30% av bilførarum koyrdu uttan trygdarbelti. Við eini umfatandi kampanju tá eydnaðist at fáa talið niður á 24%, og tað meðaltalið hevur hildið sær síðani. Við ársenda farna ár varð ein roynd gjørd aftur, og løgreglan gjørdi so kanningar undan og eftir herferðini. Men herferðin hevði als onga ávirkan – vinarligar áminningar virkaðu heilt einfalt ikki. Meðaltalið á teimum, sum ikki nýta trygdarbelti, er framvegis 24%. Men ringast stendur sum vant til hjá ungu monnunum millum 18 og 24, har 44% ikki nýta trygdarbelti. Einasta loysn tykist tí at vera at bøturnar verða hækkaðar, so tær veruliga svíða, skrivar Ferðslutrygd á heimasíðuni

## Viðmerking:

# Frælsisfylking fyri fullveldinum

Tað skulu fræg og fróð fólk til at tulka og greina fyrsta samráðingarfundin millum føroysku sendinevndina og tey, ið einaferð nevndu okkum »færinger frænder«. Torført var at hóma »gensidig respekt og forståelse«. Eitt er tó greitt, og tað er, at tey vóru innanhýsis samd. Ósemjan á sjálvstýrisvonginum hevur so mangan darvað og tarnað okkum seinastu 100 árini. Tí var hetta nakað vit kortini kundu gleðast og fegnast um henda vanlukku fríggjadag. Her verður als ikki sipað til skiftistíðina, ið boðin var, men niðrandi viðferðina okkara góðvarnu fólk fingu.

Tey trý landsstýrisumboðini lupu kortini ikki framav. Tey vóru bæði virðilig og bærilig. Vit, ið kenna okkum at varða av hesum fólkum, ið hava tikið sítt arbeiði í álvara, eiga at sláa garð um tey.

Fyri framman liggja stundum leiðir, har eingin hevur slóðað. Tey, ið ganga á odda, venda altíð bakið til teirra, ið ganga aftaná. Tað er umráðandi at kenna seg tryggan við tey, tú vendir bakið til. Vit mugu tí bakka hesi fólk upp. Íslendingar vóru har beinanvegin. Tað kenst fjálgt og gott, men týdningarmest er, at samráðingarfólk okkara kenna seg sannførdan um, at sjálvstýris- og fullveldisfólk standa teimum við lið bæði beinleiðis og í fluttari merking. Fari tí so staðiliga at



biðja politisku ungmannafeløgini hjá fullveldisflokkunum um at skipa fyri eini fólkafylking ella frælsisfylking fyri fullveldinum, ið virka skal, til fólkaatkvøðan hevur verið.

**Argir, hin 21. mars 2000**
**Karin Kjølbro**

# Skúlastjórar heita á Signar á Brúnni

**Føroya Landsstýri**
**Att: Signar á Brúnni**
**Landsstýrismann í undirvísingar- og mentamálum**

Undirritaðu skúlastjórar í Havn, sum umboða umleið triðingin av næmingunum í Føroyum, hava á fundi týsdagin, 21. mars 2000 viðgjørt søtðuna í skúlunum í býnum, nú sáttmálasettu lærararnir hava verið í verkfalli síðan 8. mars.

Av tí at sáttmálasettu lærararnir undirvísa umleið helvtina av pultstímunum, verður undirvísingin nervað í so stóran mun, at skúlin als ikki virkar sum undirvísingarstovnur. Fleiri flokkar hava ikki verið í skúla, síðan verkfallið byrjaði, og aðrir hava einans nakrar fáar tímar.

Heldur hetta fram, verður so nógv bortið niður, at tað verður drúgt at byggja uppaftur.

Støðan í skúlunum er ótolandi í løtuni, og tí verður staðiliga heitt á tygum sum landsstýrismann í skúlamálum og ábyrgdarhavandi at taka stig til, at málið verður loyst **beinanvegin.**

**Havn, 21. mars 2000**
**Eyðdis Baldvinsson, Selmar Jacobsen, Hanus Joensen, Petur Dahl, Niels Nattestad og Mortan Dalsgarð**

HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| FIAT TIPO | 120.000 | Feb. | 1991 | 35.000,- |
| FORD MONDEO | 34.500 | Apr. | 1996 | 99.000,- |
| FORD ORION DIESEL | 132.000 | Juni | 1992 | 66.000,- |
| BMW 316 (1.6) | 30.000 | Juli | 1997 | 125.000,- |
| DAIHATSU ROCKY 2.8TD | 85.000 | Apr. | 1996 | 128.000,- |
| MMC. SHOGUN TD 4x4 | 155.000 | Apr. | 1989 | 55.000,- |
| CITROËN BX 1.9 TZD ST | 159.000 | Sept. | 1991 | 61.000.- |
| MITSUBISHI COLT 1.2GL | | Jan. | 1986 | 19.000,- |
| NISSAN SUNNY DIESEL | | Juni | 1990 | 45.000,- |
| TOYOTA CARINA | | Juni | 1991 | 75.000,- |
| SUZUKI BALENO VAN | 35.000 | Aug. | 1997 | 75.000,- |

Leygardagin 25.03. hevur Bilasølan opið frá kl. 10.00-14.00

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Hoyvíksvegur 63 - FO-100 Tórshavn - Tel. 313666 - Fax 310866

Sosialurin - Tel. 311820